

*Fólk streymar út í Hest við bátum og skipum á fólkafund í 1934*



*Mannamúgva í túninum í Hesti*



*Hesir eru eisini komnir út í Hest. Kennist nakar við teir?*




*Fólkið í Hesti og Koltri skóru torv í Skopun. Sum kortið vísir hevur hetta ikki verið høgligt. Hetta sigur eisini nakað um hvussu strævið tað hevur verið.*

Men nú var so lítið mannfólk eftir at føra ímillum til Skopunar. Tað var ein rættuligur teinur at rógva til Skopunar. Tað var eitt øgiligt stríð, men tað hendi so eingin vanlukka tað, sum eg veit um.

Tað var nakað misjavnt sum torvið var í Hesti. Tað vóru tey, sum áttu góðar torvheiðar, men hjá okkum var tað vánaligt.

Tá vit systrarnar vuksu til, máttu vit tíðliga hjálpa til í húsinum. Tað sama var við at vera í torvi. Vit fóru tíðliga á oynna við mammu. Eisini minnist eg, at tá vit komu úr skúla, fóru vit báðar ofta eftir torvi. So tað var nokk so strævið.

Í Hesti veltu tey eisini korn, áðrenn mína tíð. Hetta var úti móti Hælinum. Har var so góður sólargangur.

## Konfirmerað og vaksin

Eg bleiv so konfirmerað í Havn á heysti 1929. Tá ið vit skuldu konfirmerast skuldi mamma gera okkum út, eisini við klæðum.

Tað mátti eisini sparast, tá ið tað snúði seg um klæðir. Tað, sum systir mín ikki passaði, varð seymað um til mín. So her fór einki til spillis.

Vit skuldu vera ein mánaða burtur. Vit gingu at lesa hvønn dag í Meinigheitshúsinum. Vit lærdu úr Bíbliuni og Katekismus, og so lærdu vit eisini sálmar.

Hestbørn blivu altíð konfirmerað í Havn. Vit vóru fýra úr Hesti, tá ið eg varð konfirmerað. Tilsamans vóru vit út við 60 konfirmantar. Tað var Jacob Dahl, sum konfirmeraði okkum. Hendan mánaðin, eg gekk at lesa, búði eg hjá mostir og Nikláa.

Eg minnist væl fergusiglingina hjá Nikláa. Eg var so ofta í Havn sum barn saman við mammu, tá ið hon var ørindi í Havn. Eg og dóttir hansara Ásu, sum doyði ung, vóru ofta við ferguni hjá Nikláa og beiggja hansara Tom. Tað kundi til dømis vera út á ferðmannaskipið Dronning Alexndrine, sum tá ikki fekk lagt at í Havn. Spurningurin er um nakar annar er á lívi, sum hevur upplivað hesa sigling, sum endaði, tá ið tað kom ein rættulig havn í Havn. Teir báðir vóru so óvanliga góðir brøður, hóast teir vóru so ymiskur. Tom var lættur í sinni, meðan Niklái var meira álvarsamur.

Eg var eisini javnan heima hjá Tom. Eg kendi so væl Hjørdis, dóttir hansara, sum giftist við Alfred Johannesen.

Niklái var tá blivin baptist, meðan konan framvegis var kirkjufólk, men tað var eingin illstøða fyri tað.

Sjúrður hjá Nikláa, systkinabarnið, sum doyði fyri kortum 97 ára gamal, var bert fá ár eldri enn eg. Nanna, systir hansara, og eg eru nærum javngamlar.

## Óla Kristian í Skálabúðini mundi blivið Hestmaður

Óla Kristian, sonur Amaliu og Nikláa, gekk í skúla úti í Hesti. Hann fór til Havnar at konfirmerast, og hann kom aftur út í Hest. Hann vildi ikki so fegin fara aftir til Havnar, tí hann helt ommu okkara trongja til hjálp. Hann var eisini henni til stóra hjálp, og hann var sum ein sonur fyri hana.

Óla Kristian var eisini til skips. Men hetta dámdu teimum illa í Havn. Óla Kristian róði eisini út saman við hestmonnum. Hann átti bát saman við Johan, sum var giftur við systir míni, og Sivar Kolbjørnsen. Men tá ið Óla Kristian er 20 ár er tað, at foreldrini vildu hava hann at koma aftur til Havnar, so hann kundi gera okkurt annað enn at vera skipsmaður. Men omma hevði einki ímóti tí heldur. Hon visti, hvussu vandamikið sjólívið kundi vera.

Men Óla Kristian var altíð har úti og hjálpti til, tá ið okkurt var, tað skal hann hava. Tá ið Óla Kristian kom til Havnar fór hann at koyra lastbil. Seinni kom hann at hava Skálabúðina, sum børnini hjá honum nú reka.

## Johan var kendur Hestmaður

Johan Niclasen gjørdist ein sera kendur hestmaður. Hann var kommmunustýrisformaður í 28 ár. Hann útvegaði bygdini svimjihøll og havn. Hann var eisini kendur sum Ísraelsvinur, sum enntá hevði samband við borgmeistaran í Jerusalem, Teddy Kollek. Johan doyði í 2002. Nøkur ár frammanundan giftist hann við Hermandu, sum er ættað av Selatrað. Hon býr framvegis í Hesti.

Johan var yngri enn eg, men hann kendi eg eisini væl. Hann var ein nokk so sjáldsamur persónur. Hann kundi eisini vera sera stuttligur.

Johan eigur enn eina eina systir í Hesti. Hon er eisini eitt sindur yngri enn eg.

Hans Jacob, pápi Johan, vaks upp í húsinum uppi í Stovu, har pápin í húsinum Jógvan Joensen fórst skaðadagin.

Eg kann nevna, at Jákup Hansen, f. 1881, vaks upp á bóndagarðinum í Kirkjubø. Hann var kendur sum skald tíðliga í hinari øldini.



*Jákup Dahl próstur talaði á gudstænastuni. Hann hevði eisini konfirmerað Ingibjørg*

Eg veit, at samstundis sum Jákup fór til Kirkjubøar, tá fór Hans Jakku út í Hest. Hann var 11 ár og kom av Velbastað. Pápi hansara doyði, og tey vóru so nógv systkin, so børnini fóru ymsa staðni at vera.

Systir Johan segði fyri mær, at tá ið pápi hennara kom út í Hest, tá kom pápi Jákup við honum til Kirkjubøar. Pápi Jákup, Dia í Pætursastovu segði, at hetta vóru tyngstu spor, hann var farin um Reynið, tá hann fór við honum til Kirkjubøar. Kona hansara var deyð, og tí mátti hann lata sonin frá sær. Dia var annars giftur tríggjar ferðir.

Øll í Hesti kendu Jákup Hansen við tí sambandi, sum var millum bygdirnar.

Annars giftist Jákup til Gøtu. Har var hann kallaður Havna Jákup. Hann doyði í 1967.

## Á húsarhaldsskúla

Tá ið eg var konfirmerað, fór eg heim aftur til Hest, til eg var 16 ár. Mammu dámdi, at vit skuldu fara burtur eisini at síggja onnur viðurskifti. Men knappliga ein dag sigi eg við mammu, at nú fari eg á húsarhaldsskúla uttan at hugsa um, hvat hetta kostaði henni. Umframt skúlapening skuldi eg eisini hava serlig klæðir. Vit skuldu hava fyrimiddagstoy og eftirmiddagstoy. Eisini skuldu vit hava seingjarklæðir við. Hetta kostaði alt, og tað var jú